# Vistfrøðiligt seyðahald

## Bøur

Ikki slepst undan, at beiti ella bøur, sum hevur verið sligin og hoyggjaður, má liggja ónortin eitt 24 mánaða skiftisskeið (36 mánaðir, um tað er vanligt beiti) eftir at tilfar, sum ikki er loyvt, sum til dømis evnafrøðilig handilstøð, hevur verið nýtt á tí, áðrenn tað kann váttast, at tað er "vistfrøðiligt". Kortini kann bøur, 12 mánaðir eftir broytingina, verða nýttur til beiti og at hoyggja, um ikki verður farið út um mark, sum er neyvt orðað (sí undir 'beiti og fóður'); váttast kann, at tílík øki verða umløgd.

Øll beiti mugu hava váttan fyri, at tey eru vistfrøðilig ella í broyting. Tey mugu vera í hampiligum standi, serliga, tá ið hugsað verður um, hvussu nógv verður máað burtur, og hvussu grør á teimum. Hetta er baði galdandi fyri ognarjørð og landsjørð. Vánaligt lendi má verða umvalt og bøtt, veitt og velt upp úr nýggjum, skal tað kunna fáa váttan. Ikki er loyvt at lata fenaðin ganga á biti, har ið evnafrøðilig handilstøð hava verið nýtt. Skal lendið veltast, verður malt til, at lívrunnin tøð og sankutøð verða nýtt.

## Umskiping

Dýr til kjøtframleiðslu mugu verða gitin, borin í heim og ald upp sambart vistfrøðiligu viðtøkunum. Fóður, beiti, djóralaknaviðgerð og innivist má alt frá byrjan vera í samsvari við vistfrøðiligu viðtøkurnar. Skal seyður nýtast til mjólkarframleiðslu, má hann verða vistfrøðiliga aldur í minsta lagi í 6 mánaðir (tú mást hava givið teg undir fóðurviðtøkurnar í minsta lagi teir seinastu tríggjar mánaðirnar av tí tíðarskeiðinum).

Skal eitt fylgi um skipast, má tað gerast í fleiri stigum, um so er, at vistfrøðiligi bólkurin ella bólkurin, sum verður umskipaður, er val og virðiliga avbyrgdur frá tí vanliga bólkinum. Hetta er serliga týdningarmikið, tá ið spjaldur skal setast á, tá ið skrásett verður, og tá ið teir báðir bólkarnir skulu havast inni og ella fóðrast.

## Beiti og fóður

Í minsta lagi helvtin av beitinum má vera vistfrøðilig (restin kann vera á lendi, sum verður umskipað). Seyður má ikki sleppast inn á lendi, sum teir seinastu 12 mánaðirnar hevur verið viðgjørt við evnafrøðiligum handilstøðum.

Málið má vera bara at nýta heimagjørt lívrunnið fóður, sum hevur fingið váttan. Men í skiftistíðini kann avmarkað nøgd av vanligum fóðurtilfari verða nýtt (og/ella fingið til vega uttan fyri garðin). Eins nógv av frískum fóðurtilfari eigur at verða nýtt og ómalið fóður. Nakað av samansettum/blandaðum fóðurtilfari er loyvt, um so er, at tað ikki hevur nakað av tilfari í sar, ið ikki er loyvt (sum til dømis evnafrøðiliga framleidd íblandingarevni ella tilfar, sum er arvafrøðiliga umbroytt). Um tað ber til, eigur samansett fóður at hava fingið vistfrøðiliga váttan.

Í minsta lagi 60% av fóðurtilfari má hava vistfrøðiliga váttan (100%, tá ið 10 ár eru liðin frá umskipingini). Restin má vera frá fóðuri, sum er í broyting. Bert hesi undantøk eru: Um tað ikki tey fyrstu broytingarárini ber til at framleiða nóg mikið av vistfrøðiligum fóðri ella fóðri, sum er í broyting, kann hann, ið gevur váttan, geva loyvi til at nýta so mikið av fóðurtilfari, sum er vanliga framleitt (fóður, grýn ella samansett fóðurevni), at tað telur upp í 10% av tí, sum verður givið um árið (roknað út í tí, sum turrevni rúmar), ella í mesta lagi 25% av dagsskamtinum.

## Innivist

Stroyggj, útrensl og mannagongd, tá ið sópað verður, mugu verða løgd soleiðis til rattis, at dýrini hava turt at liggja á. Hoyggj, strá, saguspønir ella annað hóskiligt tilfar má stroyast á gólv, sum eru tøtt. Í minsta lagi 50% av tí staðnum, dýrini skulu liggja á, má vera tatt (hann, ið gevur váttan, kann loyva, at upp í 50% av tí staðnum, dýrini skulu liggja á, far verið rimagólv).

Hvønn dag eiga dýrini at sleppa at ganga úti, uttan so at veðrið er av tí ringasta. Inni er tað økið, ein ær í minsta lagi skal hava at liggja á, 1,5 fermetur, og lamb 0,35 fermetur.

## Heilsu-og djóralaknavanar

Fenaðarbúnaðarfrøðin eigur at miða ímóti at sleppast kann undan sjúku og at taka við munagóðum leiðsluvanum, seta sar høg mál fyri valferðini hjá dýrunum og síggja til, at tey fáa gott at eta, soleiðis at mótstøða ímóti smittu og sjúku verður bygd upp. Altíð, tá ið tað ber til, verður malt til at nýta náttúrligan og homoopatiskan heilivág og viðgerð.

Tá ið ikki ber til at nýta aðra viðgerð, kann hann, ið gevur váttan, loyva, at vanligur djóralaknaheilivágur verður nýttur í samráð við tilnevndan djóralakna. Tann tíðin, sum vanligur heilivágur er um at fara burtur úr skipanini (tíðin frá tí at dýrið ikki longur verður viðgjørt við evninum) er í minsta lagi tríggjar ferðir so long sum tann, ið vøruframleiðararnir ella djóralaknin siga hana vera, men hon skal ongantííð vera styttri enn 14 dagar.

## Eftirlit og váttan

Viðtøkurnar fyri vistfrøðiligt seyðahald fevna um alla framleiðslueindina. Sostatt skal bóndin ganga undir viðtøkurnar fyri, hvussu jørðin verður nýtt, hvussu skrásett verður, hvussu vørurnar verða merktar, eins val og undir tar serligu viðtøkurnar fyri fenað og fyri seyðahald.

At førka seg frá vanligari til vistfrøðiliga mannagongd verður vanliga kallað ‘broyting’, og tíðin, tað tekur at førka seg, kallast at vera ‘í broyting’. Tað er av alstórum týdningi, at ein bóndi, sum atlar sar at hava vistfrøðiligt seyðahald, beinan vegin setir seg í samband við hann, ið gevur váttan, tí eftirlit má vera við broytingini. Broytingaratlan er týðandi fortreyt fyri hesi gongdini. Stórur dentur má leggjast á, at vøra kann ikki seljast sum vistfrøðilig uttan so, at garðurin, eins val og sláturhúsið og arbeiðshattirnir eru kannað og hava fingið váttan.

## Møgulig broytingarframstig

Viðurskiftini frá garði til garð eru ógvuliga ólík, tí verður broytingin styttri ella longri. Men ein eyðkendur vanligur seyðagarður, sum nýtir evnafrøðilig handilstøð seinastu ferð í mai 2000 og

samstundis fer undir umskiping, fer at hava vistfrøðiligan bø at hoyggja og til bit summarið 2002. Ull og mjólk frá óm eins val og frá lombum, sum eru gitin frá várinum 2002 og frameftir (og lembd okkurt um 5 mánaðir seinni) kunnu fáa váttan fyri, at tey eru vistfrøðilig.